

# Robbie Williams bjóðar av

Stendur tað til Robbie Williams fyrrverandi lim í dreingjabólkinum Take That so fer hann at smyrja Liam Gallagher úr Oasis av, áðrenn langt um líðir. Tað heila byrjaði tá Robbie Williams og Liam Gallagher fóru at hyggja skeivt eftir hvørjum øðrum, til tað árligu handanina av Brit Award heiðurslønini, sum er umrødd aðrastaðni í blaðnum. Úrslitið av stríðnum millum Willams og Gallagher var, at Robbie Williams kom við eini avbjóðing. Hann segði at hann var klárur at møta Liam Gallagher í boksiringinum nær tað skuldi vera. Hansara uppskot var at hvør av teimum skuldi hava 100.000 pund (svarandi til 1.2 mill í okkara peningi) við sær, sum so vinnarin av dystinum skuldi lata til okkurt góðgerandi endamál eftir egnum ynski.

Henda avbjóðingin hevur fingið rættuliga fitt av umtalu í Onglandi og eisini fólk innan boksiítrottin hava víst hesum hugskotinum áhuga. Sjálvt um enska boksisambandið ikki tekur undir við dystinum, so hevur eitt nú fyriskiparin hjá Lennox Lewis boðið sær til at skipa fyri dystinum. Verður hetta til nakað, so er talan um einki minni enn ársins boksidyst. Ein dystur har tveir teir stórstu persónarnir innan enska undirhaldsídnaðin bresta saman, og tað er nokk heldur ikki ov nógv sagt, at hetta eisini eru teir báðir, ið eru óførastir at brúka seg. Ætlanin er at dysturin skal vera boksaður eftir teimum reglum sum eru galdandi fyri amatørboksarar. Eitt krav frá teimum sum higartil hava boðið sær at skipa fyri dystinum, er tó at báðir boksararnir eru vandir av góðkendum boksivenjarum og at teir í allar mátar eru kropsliga væl fyri.



Tað einasta sum nú er eftir at fáa uppá pláss, er um Liam Gallagher játtar at trína í ringin ella ikki. Einki hevur verið at hoyrt frá honum síðani bretsku bløðini fóru at skriva um avbjóðingina. Bólkurin hjá Liam Gallagher, Oasis, er í skrivandi stund á konsertferð í Japan har teir royna at fremja søluna av teirrra seinastu útgávu sum ber heitið Standing On The Shoulder of Giants.

Ensk veddingarfeløg eru eisini farnir at vísa dystinum áhuga, og teir meta Robbie Williams hava fyrimun, hesin fyrimunur stendst fyrst og fremst av at Robbie Williams er tyngri. Tað var nevniliga eisini eitt úttalilsi um vektina hjá Robbie Williams, sum Liam Gallagher loypti øði í Robbie Williams við. "Tú ert bara ein feitur dansari" vóru orðini, men hvør veit, um ikki júst hetta verður Robbie Williams til fyrimuns í ringinum – livst so spyrst.



## UK TOP 20 CHARTS

### Albums

1 The Man Who / Travis
2 Standing On The Shoulder Of Giants / Oasis
3 On How Life Is / Macy Gray
4 Supernatural / Santana
5 Reload / Tom Jones
6 Rise / Gabrielle
7 Play / Moby
8 Come On Over / Shania Twain
9 The Woman In Me / Shania Twain
10 Performance & Cocktails / Stereophonics
11 Baby One More Time / Britney Spears
12 Invincible / Five
13 Northern Star / Melanie C
14 Surrender / Chemical Brothers
15 Schizophonic / Geri Halliwell
16 Daisies Of The Galaxy / Eels
17 S Club / S Club 7
18 Remedy / Basement Jaxx
19 Millennium / Backstreet Boys
20 Word Gets Around / Stereophonics

Kelda: BBC

## 3 arin

### Mest seldu fløgur

1 Aqua / Aquarius
2 Ymiskt / ABC Dance 27
3 Bloodh. Gang / Hooray for Boobies
4 Westlife / Westlife
5 Modern Talking/ Year of the Dragon
6 Red Hot CH Peppers / Californication
7 Creamy / Creamy
8 A1 / Here we come
9 The Dubliners / 40 Greatest Hits
10 Smach. Pumpkins / Machina - The...
11 AC/DC / Stiff uppe lip
12 Metallica / S/M
13 Ymiskt / Irish Moments
14 Britney Spears/Baby one more time
15 Ymiskt / Turn up the bass 2
16 Ragnar í Vík / The silence of a falling
17 Kular Røtur / Kular Røtur
18 Tracy Chapman / Telling Stories
19 Søs Fenger / Søs
20 Sting / Brand new day

Kelda: 3´arin

## UK TOP 20 CHARTS

### Singles

1 Don't Give Up / Chicane Ft. Bryna Adams
2 American Pie / Madonna
3 Pure Shores / All Saints
4 Mama Told... / Tom Jones/The Stereophonics
5 Sitting Down Here / Lene Marlin
6 Shalala Lala / Vengaboys
7 Movin Too Fast / Artful Dodger/Romina Johnson
8 Bye Bye Bye / N'Sync
9 Don't Wanna Let You Go / Five
10 Satisfy You / Puff Daddy Ft. R Kelly
11 Natural Blues / moby
12 Won't Take It Lying Down / Honeyz
13 Show Me The Meaning Of... / Backstreet Boys
14 Rise / Gabrielle
15 Caught Out There / Kelis
16 Money / Jamelia
17 Stop Playing With My Mind / Barbara Tucker
18 Thank God I Found You / Mariah Carey
19 Don't You Worry / Madasun
20 Cartoon Heroes / Aqua

Kelda: BBC

## Svara so!?



## 20 spurningar til Anniku Lj sstein

1. Navn?
Annika Lj sstein
2. N r ert t f¿dd?
27.02.1974
3. Ert t tr lova ella gift?
Ja, tr lova
4. Starv?
tb gvin dna arlaborant, men arbei i l¿tuni hj East-Salmon
5. N r byrja i t at sp la hondb lt?
HFr t at eg dugdi at ganga
6. Minnir kasti dystur?
M ti Neistanum sunnudagin
7. Ringasta tap?
Semifinalurnar m ti Kyndli
8. Hv¿r er F¿roya besti hondb ltsleikari?
Vesna Tomajek
9. Hv¿r er heimsins besti hondb ltsleikari?
Ta m vera Anja Andersen
10. Hvat er heimsins besta felag?
Stj¿rnan
11. Besti pers nligi eginleiki?
Gevi ongant upp
12. St¿rsti pers nligi veikleiki?
Havi for stutt fj s
13. St¿rsta uppliving?
Europa-Cup dystirnir og FM-heiti r
14. St¿rsta v nbrot?
Steypakappingin
15. St¿rsta ynski?
At vinna the double
16. Best sj nvarpinum?
Okkara kokkar
17. Besti matur?
R st kj¿t
18. Besti drykkur?
Mj lk
19. Hevur t naka fr t ar triv?
Hondb lt
20. Hevur t naka motto?
Eg skal, eg vil, eg kann